# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# NERTA IKKI UMSITINGINA

Tað vóru sera áhugaverd sjónarmið, sum fyrrverandi løgtings- og landsstýrismaðurin hjá Javnaðarflokkinum, Thomas Arabo, bar fram í Rás2 í gjár og í Sosialinum í dag, at politikarar, sum koma fram at valdinum, so skjótt gloyma, at alemnna skipanin er til fyri borgaran og ikki øvugt.

Tað er beteinkiligt, at Javnaðarflokkurin einki hevur gjørt fyri at minka um og skerja tann alt ov stóru almennu umsitingina. Eingin hevur sum Javnaðarflokkurin funnist at Finn Norman Christensen-bygnaðinum hjá Edmundi Joensen. Javnaðarflokkurin sleit samgonguna í 1996 upp á júst hetta málið. Men hvat hevur flokkurin gjørt síðani? Hann hevur nørt um somu almennu umsiting, sum nú telur helvtina so mong aðalráð, sum Finn Norman Christensen mælti til.

Og Thomas Arabo reisir eisini spurningin, hví Javnaðarflokkurin friðar hesa alt ov stóru almennu umsiting. Hví kanaliserar Javnaðarflokkurin ikki nakrar milliónir frá almennu umsitingini til eitt nú heimahjálp, sjúkrarøkt og skúlaverkið? Hví kann Javnaðarflokkurin ikki verða fremsti garanturin fyri, at vit hava eina almenna umsiting, sum er so lítil og so smidlig, sum hon yvirhøvur kann vera?

Ein annar trupulleiki hjá Javnaðarflokkinum er øvundsjúkuskatturin. Hetta gav at bíta, nú eykaskattur varð lagdur á dugnaligar fyritøkur í fiski- og alivinnuni við páskoti um, at vit nú hava fingið tilfeingisskatt. Tað er í fínasta ordan við einum tilfeingisskatti, men gerið tað so ordiligt, og latið vera við í óðum verkum at koma við eini skipan, sum hartar dugnalig vinnuvirki, meðan tey ódugnaligu sleppa undan.

Formaður Javnaðarfloksins er so fokuseraður upp á DIS'arar, sum sleppa ov lætt. Í staðin fyri at leggjast eftir slíkum bólkum, prógvið so heldur, at sosialdemokratiskur politikkur kann tryggja vælferðina. Men prógvið so eisini, at tað kann gerast uttan at leggja vinnuni fótonglar. Ein skilagóður vælferðarpolitikkur kann bara tryggjast, um vinnan fær góðar, tryggar og álítandi karmar at virka



undir. Tað kann ongantíð verða eitt sosialdemokratiskt mál at kvala tað sunna vinnulívið, tí so kvala tit eisini vælferðina.

Thomas Arabo hevur púra rætt, tá hann sigur, at flokkurin nýtir ov nógva orku upp á fjant og fjas - eins og andstøðan, sum er ov fokuserað upp á at taka burtur blokkstuðulin uttan at seta nakað alternativ í staðin - og sum eisini vil nøra eina bólgnaða almenna umsiting, sum vit ikki hava ráð at gjalda. Har er eingin realitetssansur heldur – tíverri. Okkum tørvar skynsamar politikarar, sum bæði kunnu tryggja vælferðina og skilja tørvin hjá vinnuni. Øvundsjúka og nationalisma hevur tíverri fastatøkur í føroyskum politikki.

**» Hví friðar Javnaðarflokkurin almennu umsitingina?**

# Kringvarpið blæsur við mjøli í munninum

*» - Starvsmannafelagið hartar javnan arbeiðsgevarar, sum ikki halda sáttmálan, tá størv verða sett, men ikki lýst leys.«*

Soleiðis byrjaði útvarpið hjá Kringvarpinum eitt innslag í tíðindasendingini á middegi 21. desember í fjør. Orsøkin var, at Starvsmannafelagið hevði sett ein kunningarráðgeva í starv, uttan at lýsa starvið leyst.

Og víðari segði Kringvarpið í innslagnum:

*» - Men Starvsmannafelagið sær lætt og elegant burtur frá hesum treytum...«*




Tann, ið læs tíðindini, var Dia Midjord, sum tá umboðaði starvsfólkini í stýrinum fyri Kringvarp Føroya. Søgan var góð, tí tað líkist ongum, at eitt stórt fakfelag vanvirðir grundleggjandi fakfelagsrættindi.

Men her endar logikkurin hjá tíðindadeildini í útvarpinum.

Níggju dagar seinni ger leiðslan í Kringvarpinum av at seta trý fólk í starv sum tíðindaleiðarar í eitt ár - uttan at lýsa størvini leys, soleiðis sum tey sjálvandi eiga at verða.

Men hetta sær tíðindadeildin hjá Kringvarpinum ikki sum eina søgu. Tann góða søgan, tey høvdu um Starvsmannafelagið - var knappliga ikki ein søga, tá tað snúði seg um Kringvarpið.

Rás2 setti seg í samband við nýggja tíðindaleiðaran, Beintu Løwe Jacobsen, og spurdi hana, hví hetta ikki var ein søga, at leiðslan í Kringvarpinum gjørdi sama »brølara« (sambært tíðindadeildini hjá Kringvarpinum) sum Starvsmannafelagið gjørdi.

Svarið frá nýggja tíðindaleiðaranum var stutt:

*»Onga viðmerking!«*

Vit kunnu so bara staðfesta, at meðan leiðslan í Kringvarpinum - har tíðindadeildin var umboðað, *»lætt og elegant sær brutur frá grundleggjandi fakfelagstreytum«*, so heldur tíðindadeildin nú, at hetta ikki eru tíðindi og hevur annars onga viðmerking.

Er hetta tann fjórða statsmaktin?

So kunnu vit bara staðfesta, at public service útvarpið í Føroyum blæsur og hevur mjøl í munninum, so tað stendur eftirá...



**» Illa viðfarin av Javnaðarflokkinum**

GERHARD LOGNBERG
KJAK Á SÍÐU 10



**» Havnin uppiborið virðiligari býráð**

JÓGVAN VIÐ KELDU
KJAK Á SÍÐU 20

# Einki gjørt við fjølmiðlakommisión

Tá Mentamálaráðið og kringvarpsstýrið skrivaðu undir public service sáttmálan í heyst varð samstundis boðað frá, at ein fjølmiðlakommission skuldi setast at skriva álit um verandi og framtíðar støðu fjølmiðlanna í Føroyum. Hetta fataðu vit á privatu fjølmiðlunum sum eina tátu. Tí landsstýriskvinnan í mentamálum setti til viks politisku semjuna um at fáa skipað viðurskifti á fjølmiðlamarknaðinum, tá hon ikki megnar at skapa Kringvarpinum neyðugu fíggingina.

Hetta politiska atgerðarloysi hevur ta beinleiðis avleiðing, at lívsgrundarlagið hjá privatu fjølmiðlunum er hótt. Men fyri at kyrra privatu miðlarnar, ætlaði landsstýriskvinnan at »seta eina kommisión«.

Nú ein tíð er fráliðin, hevur Sosialurin biðið um innlit í arbeiðið við hesi kommisión - og tær ætlanirnar, sum landsstýriskvinnan hevur. Men her var lítið at heinta. Í innlitssvarinum sigur Mentamálaráðið, at ráðið hevur í eina tíð arbeitt inn-



anhýsis við hesi ætlan, men at enn er kommisiónin ikki sett, og at Mentamálaráðið tískil einki tilfar hevur at útflýggja.

Halló Helena Dam á Neystabø! Ikki ein stavur er skrivaður í málinum um hesa kommisiónina. Tú hevur breiðkað skattagrundarlagið undir kringvarpinum samstundis sum tú tryggjar Kringvarpinum, at tað kann fara í eina beinharða hamrandi órættvísa kapping á lýsingarmarknaðinum við 80 milliónum almennum skattakrónum í rygginum fyri at jarðleggja privatu miðlarnar í Føroyum. Hvat hugsar tú fyri tær? Ætlar tú at tjóðartaka privatu miðlarnar í Føroyum?

Slíkur politikkur er ómentaður og sera ódemokratiskur!

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*